FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 1. juli 2026
J. nr.: 26/16182

Svar uppá grein 52a fyrispurning nr. 52-128/2025 frá Steffani Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur Akseli V. Johannesen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um at javnstilla akfør í vegskattinum.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Fer landsstýrismaðurin at leggja uppskot fram fyri Løgtingið, sum javnstillar el- og vetnisbilar við aðrar bilar í vegskattinum?
2. Um ja, nær verður eitt tílíkt uppskot lagt fram?
3. Um nei, hvør er so orsøkin til hetta?

Svar til spurningar nr. 1-3:
Sambært serfrøðingum á Landsverki hongur slitið á vegirnar saman við ástrýstinum á akfarinum, og tí vilja bilar, ið hava hægri ástrýst vanliga slíta meir uppá asfaltið á vegnum. Ástrýstið er ikki so nógv hægri fyri el-bilar enn fyri bensin- ella diesel-bilar, at orsøk er at halda, at tað gevur meira slit á vegirnar. Tað er serliga ástrýstið frá lastbilum og trailarum sum gevur meira vegslit.

Í løtuni eru tað serliga persónbilar, ið verða umlagdir til el, men tá ið lastbilarnir eisini fara at vera lagdir yvir til el, so kunnu vit fáa aðrar avbjóðingar við ástrýstunum frá teimum el-drivnu lastbilunum.

Við verandi veggjøldum fara inntøkurnar av vegskatti at minka so hvørt sum talið av elbilum økist. Neyðugt verður at endurskoða alla avgjaldsskipanina fyri akfør soleiðis vit tryggja eina burðardygga og javnari skipan og at vit eisini taka atlit til bæði slit á vegakervið og at røkka málinum innan orku- og veðurlagsøkið.

Tað er umráðandi, at tillagingin er trygt grundað og er partur av eini heild, og málið verður tí viðgjørt í einum breiðari høpi.

Fíggjarmálaráðið, 1. juli 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður